# Avloysarastørv sum málsviðgerar

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttolldeildin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

*Heimasíða www.tollskatt.fo*

*E-mail streymoy@tollskatt.fo*

Søkt verður eftir 2 avloysarum vegna barnsburðarfarloyvi fyribils í 1 ár til eftirlits- og innheintingardeildina í Streymoyar øki at byrja skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur**
**Virkiseftirlitið:** Arbeiðið fevnir um at umsita vinnuskrásetingina og hartil hoyrandi uppgávur.

**Innheintingin:** Arbeiðið fevnir um dagliga málsviðgerð av almennari skuld, herundir gera gjaldsavtalur, útrokningar av gjaldførisførleika og svara munnligum og skrivligum spurningum frá viðskiftafólki. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við ein pantifúta.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava HH-útbúgving. Viðkomandi skulu vera arbeiðssom og fyrikomandi, og skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um størvini fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Hallbjørg Hansen, deildarleiðara, á tlf. 31 02 60.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

*23. februar 2004*

**Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki**
**Postsmoga 3139**
**110 Tórshavn**

# ALMANNASTOVAN

## Málsviðgeri

Á Almannastovuni er eitt starv sum avloysari fyri málsviðgera í farloyvi á Tænastudeildini leyst at seta frá 1. mars 2004 til 1. oktober 2004.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Upprætta mál
- Skráseta inngangandi post
- Klárgering av málum
- Ymisk fyrifallandi arbeiði á deildini

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH, ella onnur fyrisitingarlig útbúgving
- Royndir innan almenna fyrisiting
- Kunnleiki til EDV serliga Scan Jour Journal

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Anne Djurhuus, deildarleiðara á tlf. 353510

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Almannastovuna**
J. Bronckgøta 27
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

í seinasta lagi 23. februar 2004. Vinarliga merki brævbjálvan: Tænastudeildin.

***Um Almannastovuna***
*Fyri at betra um tænastustøði hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni ein og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjaligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almnnastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landdekkani serdeildir.*


P/f Jógvan Weihe

BÍLEGGING AV SINI SETEPLUM

Aftur í ár fara vit at selja tey vælumtóktu finsku setepliní.
Men av tí at vit bert fáa uml. 200 sekkir á 40 kg, hevði verið gott um tit bíløgdu tey nú

Prísur fyri 40 kg. kr. 400,-

Eplini verða á goymslu miðjan mars

Annars fáa vit tey vanligu sløgini av seteplum, umframt tey nýggju sløgini

Staravegur 15 · Tel. 31 38 97 · Fartel. 21 38 97 · Fax 31 38 83
Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo
heimasíða: www.jogvan-weihe.fo




**TØKK**

Øllum tykkum, sum stuðlaðu Fólkaflokkinum á valinum 20. januar takki eg hjartaliga

Ein serlig tøkk til tykkum í Norðurstreymoy, sum stuðlaðu mær persónliga.

Hjartans tøkk

**Heðin Zachariasen**


Sosialurin
www.sosialurin.fo

i
Sosialurin
www.sosialurin.fo




# Studningar til landbúnaðin

## Studningur verður latin til landbúnaðin við heimild í løgtingslóg, nr. 32 frá 06.03.2003 og kunngerð um stuðul til landbúnaðin nr. 96 frá 17.06.2003.

*Studningur er treytaður av, at umsøkjari hevur landbúnaðarvinnu, sum er undir bókhaldsskyldu sambært § 1B pkt. 27 í løgtingslóg nr. 75 frá 24.10.1974 og er meirvirðisgjaldsskrásettur sambært løgtingslóg nr. 136 frá 08.09.1992. Undantikin ásetingini um bókhaldsskyldu og MVG-skráseting eru umsøkjarar um studning til føroysk húsdjór.*
*Umsøkjarar skulu lata skrivstovu jarðarráðsins MVG-skrásetingarskjal fyri inniverandi ár og góðkendan roknskap fyri árið fyri.*
*Umsóknarfreistirnar skulu haldast. Annars er mannagongdin viðv. teimum ymisku studningunum lýst niðanfyri.*

**Mjólk:**
Henda studning avgreiðir jarðarráðið sambært uppgerð til mjólkarvirki, sum lutar studningin út eftir innvigaðu mjólkamongdini til virkið.

**Neytakjøt:**
Umsóknarfreistin er ein mánaða, frá tí at neytið er dripið. Tá allar umbidnar upplýsingar fyriliggja, verður studningurin avgreiddur so hvørt. Studningur verður latin til neytakjøt um neytið er eldri enn 15 mánaðir. Hægri studningur kann latast til útjaðaraøkini og eru hesi: Fugloy, Svínoy, Kallsoy, Mykines, Gásadalur, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

**Seyðakjøt:**
Hesin studningur er afturbering av goldnum meirvirðisgjaldi fyri selt seyðakjøt. Umsóknin skal sendast jarðarráðnum samstundis, sum meirvirðisgjaldið verður goldið T & S fyri farna ársfjórðingin, soleiðis at hon er okkum í hendi 20. í sama mánaði. Sostatt er seinasta freist:

okt. ársfj. 20. feb.
jan. ársfj. 20. mai
apr. ársfj. 20. aug.
juli ársfj. 20. nov.

Við umsóknini skal uppgerð og kvittan fylgja við. Studningurin verður avgreiddir so hvørt.

**Stráfóður:**
Søkjast skal skrivliga sambært lýsing í bløðunum. Stráfóðurstudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senn.

**Súrhoysbrunnar:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast, tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá brunnurin er liðugur, sýnaður og góðkendur.

**Velting:**
Ætlanirnar skulu fráboðast við eini umsókn áðrenn 1. mai. Fyri at fáa studning skulu ætlanirnar vera góðkendar og studningur játtaður, áðrenn arbeiðið byrjar.
Verður arbeiðið ikki liðugt, er neyðugt at søkja aftur árið eftir. Veltistudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senn.

**Køstar:**
Søkjast kann alt árið tá ætlan fyriliggur. Studningurin verður avgreiddur so hvørt arbeiðið er liðugt og góðkent.

**Føroysk húsdjór:**
Stuðul kann veitast eftir umsókn og tilmæli frá Almennum royndum og ráðgeving.

***Umsóknir um studning skulu altíð vera skrivaðar á umsóknarbløð, sum fáast á skrivstovu jarðarráðsins tlf. 31 11 80. Á hesum umsóknarbløðunum eru prentaðar studningstreytirnar.***
***Umsóknir, ið eru skrivaðar á eldri umsóknarbløð, sum ikki eru galdandi longur ella á ljóstak av umsóknarbløðum, verða ikki góðkendar. Upplýsingar um studningsupphæddir o.a. fáast við at ringja tlf. 31 11 80.***

**FØROYA JARÐARRÁÐ**
Postrúm 50 · R. C. Effersøesgøta 4 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 11 80 · Fax 31 11 85 · Teldupostur: fj@fj.fo
Telefontíð mánadag-hósdagin 08.00-16.00 tó fríggjadag 08.00-15.00

# Pedagogur

Søkt verður eftir farloyvisvikari 30 tímar um vikuna til Barnagarðin á Teiginum

**at byrja 1. mars til 9. mai.**

Tú, sum søkir, kemur at arbeiða við børnum í útibarnagarðinum Lítla Teigi.

Børnini eru í aldrinum 4-7 ár.

Søkir eingin pedagogur verður hjálparfólk sett ístaðin.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, ið er normeraður til 12 barnagarðspláss og 10 vøggustovupláss og 20 útibarnagarðspláss.

**Krøv til umsøkjaran:**
- at tú er fleksibul
- opin og erligur
- dugir at síggja møguleikar fram um avmarkingar
- hevur góð samstarvsevnir.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til leiðaran Randi í Soylu Joensen, tlf. 361750/ 212750.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. februar og skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**
210 Sandi

# Kunngerð

## um innangarðsútskiftingarfund í Hesti

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund í Hesti mikudagin 12. mai 2004 kl. 10.00.

Til viðgerðar verður innangarðsútskifting av Hests bygd.

Nevndarlimirnir eru Jytta Juul, Funningur og Jákup Skoradal, Miðvágur.

Tórshavn, tann 4. februar 2004

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður


Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480



Plast-húsaklædningur
Massiv brettir





Viðlíka-haldsfríur
Rímuligir prísir
Á goymslu hjá:
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460


# Bilur til sølu

Reyður Mazda 6, 5 hurðar, 1.8, 122 HK við sportfelgum.

Verður seldur við stórum avsláttri.

**Tlf. 583388**